# Ætlanir eru til, fyri at verða settar í verk

EDMUND JOENSEN

**Tað er ikki nóg mikið at lesa rapportir.**

**Øll tjóðin bíðar eftir frágreiðingum ella rapportum**
Visjón 2015 hevur, um ikki annað, sett nógv fólk og bólkar at hugsa um framtíðina. Tað átti at verið positivt at fingið nógv gløgg høvd at seta sínar tankar niður á blað um alskyns hugsandi samfelagsviðurskifti. Úrslitini verða sjálvandi embætismannasvar, sum koma at liggja í rapportunum, júst sum arkitekturin, landsstýrið, hevur biðið embætisfólki gera.

**Tíðin rennur sum streymur í á**
Hvítabók var ætlaða loysnin uppá allar framtíðar trupulleikar hjá loysingarsamgonguni, undan hesari. Seks ár gingu og einki úrslit. Øll minnast vit eisini tað visjónera Caragataálitið.

Verður Visjón 2015 avloysarin hjá Hvítubók, og grundarlagið hjá hesi samgonguni undir at lítið og einki hendir? Trý ár eru farin og sett er á fjórða hjá hesi samgonguni. Valár er, og ikki sæst enn nakað tekin til nakra samlaða politiska ætlan, sum kann føra Føroyar fram á leiðina, og sum kann innheinta nakað av tí afturúrsiglda. Tað tykist sum øll tjóðin bíðar eftir rapportunum frá embætisfólkunum.

**Politiskar ætlanir og tiltøk mangla**
Eru tað ikki politiskar ætlanir og tiltøk sum tróta? Ætlanir og tiltøk sum áttu at verið klár at sett í verk, og sum eiga at koma nú. Bíðitíðin eftir rapportum má ikki verða brúkt sum skjól fyri at síggja út av onkrum, sum ikki er.

Flestu okkara vita eftir hondini hvussu eitt samfelag eftir besta norðurlanda modelli skal síggja út, og hvørjar høvuðsreglur eiga at galda. Vit kunnu taka nøkur høvuðspunkt, sum øll eru fortreytir fyri at vit kunnu standa okkum í kappingini, og fyri at vit kunna liva upp til at verða eitt vælferðarsamfelag. Hetta eru alt tiltøk, sum ikki nýtast at bíða eftir føroyskum rapportum, fyri at verða sett í verk.

**Undirvísing og gransking eru grundarlagið**
Undirvísing og gransking er sjálvt fundamentið undir vitanarsamfelagnum. Tosað hevur verið almikið um granskingardepil og annað mangt, men einki hendir. Tað tróta ikki rapportir um skúla, sjúkrahús, alment og privat o.s.fr. Hvørjum bíða vit eftir annað enn politiskum avgerðum?

**Tað almenna og tað privata fyritaksemið**
Tað ræður um at hava almennu uppgávurnar fyri seg og tær privatu fyri seg. Hetta er galdandi í allar flestu førum. Tað privata gongur á odda í inntjening og skapar framburðin og harðan valuta til samfelagið. Tað er viðurkent av teim flestu eftirhondini, at tað privata er munandi betri til hesa stóru uppgávu, og føroyingar standa í bíðirøð, fyri at átaka sær uppgávuna. Skyldan og ábyrgdin hjá tí almenna er ikki minni av teirri orsøk. Tað almenna eigur alla tíðina uppgávuna at syrgja fyri, at karmarnir hjá privatu vinnuni eisini eru á hædd við tað besta. Her haltar í ólukku mát. Ikki tí, rapportir tróta ikki um hesi viðurskifti.

**Hvar blíva privatiseringarnar av?**
Ávegis privatiseringar sum Sambandslandsstýrið 1994 – 98 syrgdi fyri við avmonipolisering av Tryggingarsambandinum, Føroya Tele, Atlantsflogi og Føroya Banka eru allar sólskinssøgur, men komu ikki víðari. Her tróta heldur ikki rapportir um hvat gerast skal. Ætlanir eru til, fyri at verða settar í verk. Einki er verri enn álitisbrot, eisini millum tað privata og tað almenna. Hvørjum bíða vit eftir? Ikki rapportum, men politiskum avgerðum.

**Leggja Føroyar tætt uppat Evropa**
Flestu okkara vita til dømis, at Føroyar eiga at leggja seg tætt uppat Evropa. Her eru vit sum land afturútsigld so tað forslær. Tað finnast uppí skuffur av tilfari (Rapportum) um hesi viðurskifti. Her – og í heila tikið – nýtast ikki fleiri rapportir. Politiska uttanumtosið má halda uppat. Ístaðin eigur at vera farið í holt við at loysa uppgávurnar.

Við vón um at nakað kemur av skafti, fari eg at enda við at ynskja øllum eitt eydnuríkt nýggjár.

# John Johannesens veika »samgonga«

GUNNAR ISFELD
lesandi

Mær dámar væl at síggja John enn einaferð vísa á, at tað ikki júst er talan um *sam*-gongu millum teir báðar borgarligu (høgra-) flokkarnar og vinstravongsflokkin, Javnaðarflokkin.

Sjálvsagt ganga hesir flokkar ikki somu leið. Tó eru teir í samgongu, sum nokk má fatast sum eitt gott dømi um tolsemi – ja og tolni. Sjálvt um hesar dygdir ikki skulu vera tær einastu, sum halda einari samgongu saman.

John ger tað heilt greitt, at tað vóru Sambandsflokkurin, Fólkaflokkurin og Miðflokkurin, sum valdu at taka undir við uppskotinum, um at lata amerikansk hernaðarflogfør treytaleyst flúgva yvir Føroyum. Somuleiðis ger John tað greitt, at Javnaðarflokkurin var størsti mótstandarin av hesum. Gott í tykkum javnaðarfólk. Men tá sótu tit jú í andstøðu. Sjálvur haldi eg tað vera eitt sindur átaluvert, at vit tjóðveldisfólk ikki talaðu harðari ímóti uppskotinum/loyvinum; men eg vil tilskriva hetta tann veruleika, sum tá var, at Tjóðveldisflokkurin sat í samgongu við, serliga, Fólkaflokkinum, og at hesir báðir *sam*gonguflokkar tá høvdu trupulleikar nokk sum var í at "ganga saman".

Eftir tí at døma, sum Hergeir Nielsen og Høgni Hoydal nú siga, so má tann relativa tøgnin í 2002 frá tjóðveldisfólki vitna um henda veruleika, at Tjóðveldisflokkurin ikki vildi elva til størri innanhýsis stríð í samgonguni. Men lat hetta ikki skilja okkum meira. Tit, javnaðarfólk, róptu harðast tá, og nú rópa tjóðveldisfólk harðast. Soleiðis er tað ofta við andstøðuflokkum. Lat okkum nú rópa saman – eisini sjálvstýrifólk og demokratiskar sálir í hinum flokkunum – heilt til Danmarkar og helst eisini til USA:

Vit góðtaka ikki píning og órættvísi og als ikki áhaldandi brot á mannarættindi og brot á demokratiskan hugburð yvirhøvur. Og tað er vorðið sum hyklarí, tá høvuðstjóðin aftanfyri Irakkrígnum, USA, júst talar fyri at demokratisera hetta stakkals Irak.

Men hetta góðtekur "okkara" samgonga.

# Føroyaveðrið: Framvegis kalt

**- Seinni parturin av vikuskiftinum verður turt, eins og sólin kaggar fram, sigur veðurmaðurin Petur Skeel Jacobsen**

VEÐRIÐ
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Hesa seinastu vikuna hevur verið rættiligt kavaveður við kulda og kava.

- Í roynd og veru er miðalhitin higartil í januar mánaði lægri enn í fjør, sigur hann.

Líkt er bara til, at kavin verður liggjandi nakrar dagar aftrat.

Sambært Peturi Skeel verður heldur lýggjari í morgin, men kortini er møguleiki fyri vátakava ella regnæli. Hitin verður millum 3 og 6 stig.

Sunnudagin verður hvassur vindur av landnyrðingi við sólarglottum, men kortini kunnu vit rokna við kavaælum og hita um frostmarkið.


*- Lægri miðalhiti í januar mánaði í ár, sigur Petur Skeel*

Mánadagin minkar hann vindin nakað, og tað verður turt við sólarglottum, har hitin framvegis liggur um frostmarkið.

Mánadagin og týsdagin verður framvegis útnyrðingur, turt og sólarglottar, men heldur lýggjari – millum 2 og 6 stig.

Væntast kann tí, at kavin er burtur, tá vit eru komin nakað inn í næstu viku.

# Nøvn hoyra ikki heima í spennitroyggju!

ANNA M. HENTZE

**Hugleiðingar, og aftursvar til Eyðun á Borg**
Tað gleddi meg almikið, tá eg sá í fjølmiðlunum, at Simun Nónklett og onnur høvdu tikið stig til at stríðast fyri, at ávís bygdanøvn, sum í áravís hava livað sítt kúgaða lív á bygdaskeltum, aftur verða sett í frælsi.

Ofta dámar mær væl at lesa tær skilagóðu hugleiðingarnar og frágreiðingarnar hjá Eyðuni á Borg. Men tá hann í lesarabrævi skrivar, at bygdanøvnini Skála og Lamba skulu førast aftur til hvørfalsformin av kallkynsorðunum skáli og lambi, og hesin hvørfalsformur skal setast á bygdaskeltini ístaðinfyri bygdanøvnini, (og hetta hevur, sum kunnugt, tíverri verið galdandi í fleiri ár) tá haldi eg, at hetta er at brongla og gera seg inn á nøvnini. Í hesum sambandi komi eg at hugsa um bygdarnavnið Lopra. Eg veit ikki vist, men eg havi ein varhuga av, at hetta navnið sleppur at standa óskalað á bygdarskeltinum.

Um tey, sum eita í Lambanum, skulu greiða okkum óvitandi frá, hvat kallkynsorðið lambi merkir, mugu tey ráða fyri. Tað hevði í hvussu so er verið sera áhugavert at fingið eina frágreiðing um orðið. Men hvørki móðurmálsorðabókin ella Færøsk Anthologi hava nakað boð upp á orðið. Í Samlagets Norrøn Ordbok finna vit tó orðið lambi. Har standa viðmerkingarnar: m. (-maskulinum; hannkjønn;) Tn (-tilnamn;) og M. (-mannsnamn;) og síðani stendur: Avl. (-avleiing;) av lamb.

Taka vit samanum, vita vit, at bygdanøvnini Skála og Lamba líkjast nær skyldum kallkynsnavnorðum. Hetta eiga vit tó ikki at fáa ilt av, so at vit stappa tey inn í bendingarmynstrini hjá hesum orðum, uttan har, tað fellur náttúrligt.* Ein nógv betri máti hevði verið at skriva fyrisetingarnar framman fyri nøvnini: á Skála, í Lamba, við Gjógv.

* T.d. fer eingin inn í Skála bygd, og sigur seg vera í skálanum

Tað er eingin náttúrulóg sum sigur, at øll bygdanøvn skulu standa í sama falli. (hvørfalli) Nógv heldur eiga vit, við virðing fyri okkara vakra máli, og okkara forfedrum, ið lótu okkum málið við øllum tess fjølbroytni, at varðveita, heldur enn at forbrongla ella einsrætta.

Ein partur av okkara málsliga arvi eru okkara vøkru, spennandi staðar- og bygdanøvn. Tað er eitt sindur á sama hátt sum við náttúruni: Við virðing fyri eftirkomarum okkara, ið hava sama rætt sum vit til málið, royna vit at lata arvin víðari í sama góða, fjølbroytta standi, sum tá alt var nýtt fyri okkum. (sjálvandi vita vit, at málið broytist við tíðini, á sama hátt sum samfelagið, umstøðurnar og arbeiðsamboðini broytast) Her er tó vert at minnast til, at talumálið var til áðrenn skriftmálið, og at tær neyðugu og nyttuligu rættskrivingar- og bendingarreglurnar eiga at tæna og styðja, men ikki at kúga málið.

Hugleiðast kann um, um Lopra er í ætt við nakað (ókent) kallkynsnavnorð, ið eitur ein "lopri"? Um so var, hevði navnið verið dømt til somu syrgiligu lagnu sum Skála og Lamba. Tað kann tó hugsast, at navnið er systkinabarn til eitt (eisini ókent) kvennkynsnavnorð: ein "lopra"? Um so var, høvdu vit farið til "Lopru". Navnið kundi sjálvandi eisini komið av einari á, ið ofta leyp, osv. osv. Nei, tað sum eg hervið royni at siga, er, at nøvn eru egin. Stendur Lopra í hvørfalli? Nøvn, staðarnøvn, bygdanøvn, - tey rúmast ikki altíð inni í bendingarmynstrum. Og tá tey ikki rúmast, tá eiga tey at fáa frið!

Eyðun á Borg skrivar eisini:

"Bygdanøvn verða søgd og skrivað óbundin."

Til hetta er at svarað: Ja, sum oftast. Tað er tó minst eitt undantak: Hellurnar: Eg havi hug at spyrja: Hvussu er t.d. við Fámjin, Skopun, Vestmanna* og Saksun? Kunnu hesi bygdanøvn bendast, í kyni, falli ella tali? Ella bindast?*Bygdin eitur jú, á nútíðarmáli í hvussu so er, Vestmanna. (og ikki Vestmannahavn, ið, um so var, bæði kundi verið bundin og bend)

Og víðari:

"Vit kunnu neyvan taka eina bygd burturúr og lata hana vera bundna. Tí skriva vit Hellur, sjálvt um vit kanska siga Hellurnar í talumáli. "

Vit ikki bara kanska siga Hellurnar í talumáli. Vit siga heilt vist Hellurnar í talumáli. Bygdin eitur Hellurnar, og vilja vit skriva rætt, so skriva vit tað rætta navnið. Sjálvsagt!

Við vinarligari bygdanavnakvøðu.